# Vísa seg fram

Konsert var í Miðlahúsinum í Vágsbotni hóskvøldið.

- Fríggjakvøldið vístu vit fram, hvat vit millum annað hava at bjóða á Summartónum í ár. Fólkatónleikur, klassiskt, og jassur verður millum annað á skránni, sigur Kristian Blak.

- Vit vilja fegin vísa, at vit hava nýggjan tónleik at bjóða, sigur Kristian Blak

Summartónar hava verið skránni á hvørjum ári síðani 1992.



*Felagið Føroysk Tónaskøld hava gjørt tónleikin, sum varð framførdur í Miðlahúsinum fríggjakvøldið*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Smádrongur á bláman við súkklu

- Vandamikið var tað ikki, men komiskt var tað. Mamman rópti á drongin, at nú mátti hann ansa sær, tá hann súkklaði eftir bátabrúnni á Argjum. "Ja ja mamma" rópar drongurin á súkkluni, meðan hann stoltur fer veittrandi út av bátabrúnni og bums á sjógv við súkkluni.

Tað var Meinhard Jacobsen, sum var eygnavitni til hendingina á Argjum leygardagin. Hann sigur, at ongin skaði stóðst av hendingini. Mamman fiskaði drongin uppaftur, og súkklan varð drigin í land í góðum standi. Drongurin varð kløkkur av hendingini, men kom fyri seg beinanvegin.

## Fleiri smakkaðu sær á

Ølsmakking var á Rex í fríggjakvøldið. Havgrímur Johannesen sigur, at tiltakið varð væl vitjað, og at ølsmakking verður eitt afturvendandi tiltak.

Ølirnar vóru fleiri at velja ímillum. Sluppøl, Veðr, Classic, Black Sheep, og Stout rann úr hanunum í gjárkvøldið.

Havgrímur Johannesen aftanfyri Rex sigur, at fleiri fólk høvdu leitað sær niðan í náttklubban hetta kvøldið. Hann sigur, at líkandi tiltøk verða at síggja á staðnum í framtíðini.

## Nokta at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð

Magistarafelag Føroya hevur roynt at fingið avtalu við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um vaktarhald og úrtíðararbeiði á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Hetta hevur ikki eydnast, og nú noktar Magistarafelag Føroya limum sínum at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Magistarafelagið ásannar í tíðindaskrivi, at hetta hevur við sær, at allar uppgávur á millum annað veterinera økinum á Heilsufrøðiligu starvsstovuni bert verða framdar í vanligari arbeiðstíð.

Avleiðingarnar fyri vinnuna kunnu hugsast at verða stórar, tí sjúkufyribyrgjandi arbeiðið á fiska- og djórasjúkuøkinum verður ikki gjørt uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

## Jóansøkubál í Sandagerði týskvøldið

Bál, røða, felagssangur og føroyskur dansur er á skránni. Gulla Øregaard flytir fram røðuna í ár.

Tórshavnar býráð skipar fyri jóansøkubálinum, eins og undanfarin ár. Bálið verður av ongum, um veðrið er vánaligt.





Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

